Vikuskiftis Sosialurin
Nr. 203 - 23. oktober 2009

## Íslendingar liva longst

Í nýggju árbókini við norðurlendskum hagtølum er mangt áhugavert. Eitt nú sæst har, at íslendskir menn liva longri enn teirra norðurlendsku brøður, og at íslendskar kvinnur og svenskar kvinnur liva longri enn systrar teirra í hinum londunum. Hagtølini vísa, at íslendskir menn liva 79,6 ár. Ein frágreiðing er kanska, at sambært somu árbók eru tað bara 20 prosent av monnunum í Íslandi, sum roykja. Teir kunnu tó ikki kappast við sviar, tí í Svøríki eru tað bara 13 prosent av monnunum, sum roykja.



## Ólógligt eftirlit

Danska reiðaríið Scandlines hevur fingið forboð fyri at brúka kykmyndatól til at halda eftirlit við starvsfólki umborð á ferjunum. Reiðaríið fekk kærur frá ferðafólki, sum kærdu seg um, at starvsfólk umborð á ferjunum, sum sigla millum Gedser og Rostock, hava stolið ymiskt frá teimum. Tí gjørdi reiðaríið av at seta kykmyndatól umborð á skipini at halda eyga við starvsfólkinum. Tað góðtók manningarfelagið 3F ikki, og nú hevur tann í Føroyum kendi hægstarættardómarin Thomas Rørdam givið fakfelagnum viðhald.

# Heimsbúskapurin er ikki komin á botn



*Johnny í Grótinum frá Føroya Banka og Arvid Jakobsen búskaparfrøðingur í Perluni*

**Útlitini til enn eitt umfar við svartskygni, áðrenn tað lýsnar av álvara, talar fyri einum virknum búskaparpolitikki til at halda gongd í virkseminum í landinum varð ein av niðurstøðunum á fundi í Perluni í vikuni**

BÚSKAPUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir Jan Müller*

"Er heimsbúskapurin komin á botn?" var stóri spurningurin, sum nógvu áhoyrarnir í Perluni mikukvøldið fingu eitt svar upp á. Mikukvøldið skipaði Føroya Banki fyri einum vælvitjaðum íløgutiltaki í Perluni, har viðurkendi búskaparfrøðingurin Arvid Jakobsen frá LD Invest gav eitt boð upp á útlitini fyri heimsbúskapin.

Búskaparfrøðingar hava ein forkærleika fyri bókstavum, tá konjunkturgongdin í búskapinum skal lýsast. Soleiðis hevur eisini verið í sambandi við heimsumfatandi fíggjarkreppuna, sum elvdi til enn ein lágkonjunktur í heimsbúskapinum í 2008. Fyri at svara spurninginum um, hvussu skjótt vit sleppa burturúr aftur naggatódnini, nýta búskaparfrøðingar bókstavirnar U, L, V og W.

Á heysti 2008 var hildið, at hetta var ein heldur ógvuslig niðurgongd í búskapinum, sum fór at taka drúgva tíð at koma burturúr aftur, eins og eitt U. Men í november 2008 steðgaði heimshandilin næstan fullkomiliga upp í einum, og tað fekk búskaparfrøðingar fyrstu mánarnar í 2009 at umrøða møguleikan fyri, at vit skuldu síggja eina endurtøku av tí stóru depressiónini í 1930'unum, tá heimshandilin síðstu ferð steðgaði fullkomiliga upp. Gongdin kundi soleiðis fara at líkjast einum L.

Júst tá búskaparfrøðingarnir og journalistarnir høvdu funnið gomlu søgubøkurnar um 1930'ini fram, tørnaði framleiðslan í heimsbúskapinum fyri aftur í mars 2009. Nú er man tí farin at tosað um ein knappa búskaparvending álík einum V. Hetta hevur man eisini sæð aftur í ógvusligum hækkingum í partabrævakursunum kring knøttin.

Men talan var um serstakliga ógvusligar tillagingar í vørugoymslunum kring knøttin, sum høvdu elvt til ein nærum fullkomnan steðg í heimshandlinum vetrarmánarnar. Av tí at vøksturin í endaliga eftirspurninginum var fallin munandi serliga orsaka av, at húskini kendu seg fátækari av lækkandi húsaprísum, máttu framleiðarnir kring knøttin í gongd við at tillaga goymslurnar til nýggju støðuna. Fyri at minkað um goymslurnar má framleiðslan minkað munandi meiri enn eftirspurningurin, men tá goymslurnar eru tillagaðar, fer framleiðslan aftur at vaksa skjótt. Hetta hava vit sæð síðani mars.

Her var so boðskapurin hjá Arvid Jakobsen, at vit næstu 3-6 mánarnar alrahelst aftur koma at síggja eitt ávíst svartskygni breiða seg yvir marknaðirnar, tí at endaligi eftirspurningurin ikki er komin fyri seg enn. Húskini í USA eru framvegis plágaði av stórum arbeiðsloysi og avleiðingunum av ógvusliga lækkandi húsaprísum síðstu 3 árini. Tá eftirspurningurin framvegis er víkjandi, vil framleiðslan – nú goymslurnar aftur eru fyltar – tillaga seg nýggja støði. Sostatt kunnu vit fáa eina gongd líknandi einum W.




Svarið upp á stóra spurningin var sostatt, at heimsbúskapurin ikki er komin á botn enn, men at búskapurin tvørturímóti kann væntast at taka enn ein niðurtúr komandi 6-9 mánarnar inntil rættuligi búskaparvøksturin slær ígjøgnum á sumri 2010. Tá so vøksturin av álvara slær ígjøgnum í seinnu hálvu 2010 við lækkandi arbeiðsloysi og batnandi álitið hjá húskjunum, gerst helst talan um munandi búskaparvøkstur.

Á íløgutiltakinum í Perluni hevði Johnny í Grótinum, íløguleiðari í Føroya Banka, eitt stutt innlegg um búskapargongdina í Føroyum síðsta árið og útlitini fyri føroyska búskapin í ljósinum av útlitunum til eina vending í heimsbúskapinum komandi ár. Føroyski búskapurin er tætt tengdur at gongdini í heimsbúskapinum, tí altjóða samhandilin er lutfalsliga stórur partur av búskapinum. Minkingin í heimshandlinum sæst aftur í, at mánaðarligi fiskavøruútflutningurin úr Føroyum er minkaður við umleið 40% síðani á sumri 2007. Hinvegin er útflutningsvirðið av alifiski meiri enn tvífaldað í sama tíðarskeiðið, tí er samlaði útflutningurin bert minkaður umleið 6-7%. Útlitini til enn eitt umfar við svartskygni, áðrenn tað lýsnar av álvara, talar soleiðis fyri einum virknum búskaparpolitikki til at halda gongd í virkseminum í landinum.



*Nógv fólk høvdu leitað sær í Perluna at hoyra um heimsbúskapin*